TK Stovan

## TK STOVAN ER Í EYSTUROY Í VIKU 4

**Vit vitja allastaðni í Føroyum, men hesa vikuna geva vit Eysturoy serligan gætur. Frá 20. til 24. januar vera fólk frá TK Stovuni í Eysturoy. Hesar dagar kunnu ráðgevar okkara skjótt og lætt vitja virkir í oynni.**

Endamálið hjá TK Stovuni er at skapa vøkstur og menning á smáum og miðalstórum virkjum. Virkisráðgevar okkara eru royndir og góðir í ráðum. Teir svara spurningum um rakstur, uppfinning, ígongdseting, menning og leiðslu. Røkkur okkara kunnleiki ikki, fáa vit samband í lag við aðrar ráðgevar.
TK Stovan er sjálvstøðugur vinnuframastovnur, sum er alment fíggjaður. Tað er ókeypis at fáa ráðgeving frá TK Stovuni í avmarkað tíðarkeið.

**TK Stovan veitir m.a. ráðgeving um:**
- Leiðslu/starvsfólkaleiðslu
- Sølu og marknaðarførslu
- Góðsku og umhvørvi
- Vøru- og framleiðslumenning
- Fyrisiting
- Fígging, búskap og KT

**TK Stovan kann eisini veita aðra tænastu. Til dømis:**
- Samanbera virkir (benchmarking)
- Stovna ERFA-bólkar
- Finna yrkisnevndarlimir
- Hjálpa uppfinnarum, m.a. við patentum
- Hjálpa til við at leggja ættarliðsskifti á virkinum til rættis
- Hjálpa til við at finna fígging til verkætlanir

Vilja tit vitja okkum ella hava virkisráðgeva okkara inn á gólvið er at ringja á telefon 317366 ella at senda okkum teldubræv á tk@tk.fo.

**TK Stovan**
Niels Finsens Gøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnilívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.



# Landsfundur Sjálvstýrisfloksins

verður í Kappróðrarneystinum á Glyvrum

25. januar 2003

Aðalfundurin verður kl. 10.00

Kl. 13.00 verður politiskt orðaskifti

Aftaná verður døgverði

Øll sjálvstýrisáhugað eru vælkomin

**Sjálvstýrisflokkurin**
*- ger góðar tíðir betri*

www.tingakrossur.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Býlingshúsið undir Brúnni**

Í Býlingshúsinum undir Brúnni ganga 47 børn.

Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðs-stovum og einari vøggustovu.

Á stovninum eru 11 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum, og tú fært høvi at gera tína ávirkan galdandi.

www.torshavn.fo

## Pedagogur til Býlingshúsið undir Brúnni

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogi 35 tímar um vikuna í barnagarðsstovu við 3-7 ára gomlum børnum. Starvið verður sett 1. februar 2003 ella skjótast til ber

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Turið Horn, leiðara, tlf. 319180 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Býlingshúsinum undir Brúnni, Smærugøta 9B , 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 31. januar 2003.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Margarinfabrikkin**

Margarinfabrikkin er eitt frítíðar- og virkishús fyri størri børn (8-12 ár) og ung (13-19 ár).

Opið er gerandisdagar frá kl. 12.00-17.30 fyri børn, og frá kl. 18.00-22.00 fyri ung.

Margarinfabrikkin er framvegis í støðugari menning har roynt verður at fylgja við menningini og tí nýggja rákinum, ið rørist millum børn og ung.
Samstundis verður roynt at geva teimum ábyrgd og samávirkan til virksemið í húsinum.

www.fabrikkin.fo

## Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi/lærara ella fólki við royndum innan skapandi faki til Margarinfabrikkina, 25-40 tímar um vikuna.

**Vit vænta**
at umsøkjarin:
- er áhugaður í at arbeiða við størri børnum og ungum
- er opin, vísir ábyrgd og er positivur
- hevur áhuga í skapanarevnum/er skapandi
- er fyrikomandi og kann arbeiða sjálvstøðugt
- vísir virðing fyri sínum medmenniskjum

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við Føroya pedagogfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Henrik Andersen, tlf. 312217, millum kl. 13.00-18.00, ella Katrina Petersen, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 3. februar 2003. Viðmerk á umsóknina "Pedagogur til Margarinfabrikkina".



## J & K Petersen

Søkt verður eftir røskum monnum til jørð- og betongarbeiði í Tórshavn.

Arbeiðið byrjar fyrst í februar.

**P/F J&K Petersen**
Tlf. 315060/215065
e-mail: JKP@JKP.FO



Lesið Sosialin





LISTASTEVNA FØROYA 2003 • 7.-17. august

**YRIKINGAKAPPING**

Listastevna Føroya bjóðar við hesum til kapping at skriva nýggjar, føroyskar yrkingar.

Yrkingarnar skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Handritini skulu verða latin Listastevnu Føroya í seinasta lagi 1. mai 2003.

Ein dómsnevnd metir um tær innkomnu yrkingarnar.

Í dómsnevndini sita: Høgni Djurhuus,tíðindamaður, Bergljót av Skarði, studentaskúlalærari og Kim Simonsen, cand. phil í norðurlendskum bókmentum.

Dómsnevndin skilar sær rætt til onga virðisløn at lata.

Handritini skulu verða skrivað soleiðis, at frástøðan ímillum reglurnar er 1.5, og tey skulu latast Listastevnu Føroya í einari pappírsútgávu og einari teldutøkari útgávu.

Handritini skulu verða send á tann hátt, at inni í brævbjálvanum, sum handritið verður sent í, verður lagdur ein afturlatin brævbjálvi við navninum á yrkingini/yrkingunum og á henni/honum, sum skrivað hevur.

Í virðisløn verða latnar kr. 5.000,- fyri hvørja av teimum 10 bestu yrkingunum.

Hesar yrkingarnar vera lisnar í Útvarpi Føroya, í táttinum *listastevnuyrkingin 2003* - ein yrking um dagin, meðan listastevnan stendur.

listastevna føroya art festival
Norðurlandahúsið í Føroyum • Box 1260 • FO-110 Tórshavn



*Meginfelag áhugaleikara Føroya*

**MÁF** - undir Pisuvarða 2 - FO-110 Tórshavn - Postsmoga 185 - Føroyar - tlf. 315624 - faks 315924
Teldupostur: maf@maf.fo . Heimasíða: www.maf.fo

## Sjónleikaraskeið í Suðuroy

Vikuskiftið 21.–23. februar 2003 skipar MáF fyri einum spennandi sjónleikaraskeiði
á **Gistingarhúsinum við Á** í Øravík.
Skeiðið vendir sær til allar suðuroyingar yvir 16 ár, sum hava áhuga fyri sjónleiki,
**– royndar sum óroyndar.**

Tema: **Í staðin fyri at kroppurin stendur í vegin - vísir hann tær vegin**

Arbeitt verður við grunleggjandi sjónleikaravenjingum, dansi, improvisatión og tekstbrotum.

**9 skeiðstímar íalt**

Kostnaður: kr. 300 fyri undirvísing og ábit.
Undirvísari: Bárður Persson úr Leikarafelag Føroya

**Tilmelding hjá MáF, tlf. 315624, teldupostadressa maf@maf**



www.sosialurin.fo



LISTASTEVNA FØROYA 2004 • 6.-16. august

**SKALDSØGUKAPPING**

Listastevna Føroya bjóðar við hesum til kapping at skriva nýggja, føroyska skaldsøgu.

Handritini skulu ikki hava verið almannakunngjørd áður

Skaldsøguhandritini skulu verða latin Listastevnu Føroya í seinasta lagi 1. mai 2004.

Ein dómsnevnd metir um tey innkomnu handritini.
Í dómsnevndini sita: Katrin Næs, studentaskúlalærari, Turið Kjølbro, cand.phil í norðurlendskum bókmentum og Bergur Hansen, mag.art í norðurlendskum bókmentum.

Dómsnevndin skilar sær rætt til onga virðisløn at lata.

Handritini skulu verða í minsta lagi 75 A-4 síður til støddar, tey skulu vera skrivað soleiðis, at frástøðan ímillum reglurnar er 1.5, og tey skulu latast Listastevnu Føroya í einari pappírsútgávu og einari teldutøkari útgávu.

Handritini skulu verða send á tann hátt, at inni í brævbjálvanum, sum handritið verður sent í, verður lagdur ein afturlatin brævbjálvi við navninum á skaldsøguni og á henni/honum, sum skrivað hevur.

Í virðisløn verða latnar kr. 150.000,- fyri besta handritið.

listastevna føroya art festival
Norðurlandahúsið í Føroyum • Box 1260 • FO-110 Tórshavn



# ÚTSØLA Í LÍNBÚÐINI

byrjar mánadagin 20. januar kl. 9.00




**Línbúðin**
Tróndagøta 32 • 100 Tórshavn • Tel. 31 23 85